

*Íslendska Altingið í Reykjavík heldur til í hesum bygninginum*

# Haarde: ES óhóskandi fyri Ísland

REPORTASJA

*Reykjavík*
*Carl Jóhan Jensen*

Blaðmaðurin hjá Sosialinum var staddur í Laugardalshøllini, tá ið landsfundurin hjá Sjálfstæðisflokknum varð settur og eftir setanina fekk hann orð á floksformannin, sitandi forsætisráðharra Geir H. Haarde, eina løtu (í einum króki á eini hanavels-veitslu).

Blaðmaðurin legði fyri við at spyrja, hvørjar grundgevingar hjá Sjálfstæðisflokknum hevur fyri andstøðu síni móti ES-limaskapi.

- Nú er ES-spurningurin ikki ovarlaga á breddanum í hesum valstríðnum, svaraði Geir H. Haarde. Kortini hevur orðaskiftið um ES nokk so javnan stungið seg upp og ein flokkur, Samfylkingin, hevur ES-limaskap sum stevnumið, um nakað álvara í hesum hjá teimum, er ilt at ætla. Herfyri legði ein serstøk tingnevnd, Evropanevndin, sum forsætisráðharrin setti í 2004, fram eitt drúgt álit um ES-spurningin (Sí: www.forsaetisraduneyti.is/utgefid-efni/nr/2558). Niðurstøðan í álitinum er, at tað loysir seg best fyri Ísland at verða verandi í EBS-samstarvinum í tí skili, sum tað er nú.

- Onkrir fyrimunir kunnu helst fáast við limaskapi, treyðugt so, men eg hugsi kortini, at vansarnir vera fleiri, tá ið samanum kemur. ES-limaskapur hóskar ikki til okkara viðurskifti. Hetta staðfestir álitið eisini. Eitt nú hevði okkum ikki borið til at føra ein sjálvstøðugan fiskivinnupolitikk í ES. Og tað einsamalt kolldømir eftir mínum tykki íslendskan ES-limaskap. Og so eru eisini onnur viðurskifti, sum gera seg galdandi. T.d. høvdu vit noyðst at latið fullveldi frá okkum til ES-stovnar. Vit høvdu eitt nú ikki kunnað gjørt fríhandilssáttmálar við onnur lond sum áður. Í løtuni eru ein fríhandilssáttmáli við Kina í umbúna. Ísland er fyrsta landið í Evropa, sum roynir tað. Somuleiðis benda aðrar umstøður eisini á, at tað eru óráð at fara upp í ES.

Hvørjar umstøður til dømis?

- Ja, tak kostnaðin og ta byrðu, sum hevði verið í limaskapi hjá umsitingini. Okkara umsiting er, sum tú helst veitst, upp á seg lítil. Hinvegin dugi eg væl at skilja, at ES í mangar mátar kann vera ein ávinningur fyri fleiri lond í Evropa, serliga hesi nýfrælsu londini eystanfyri, ið dragast við ófullkominundirstøðukervi, vánaligan búskap og valdamiklar grannar. Hjá okkum er afturímóti heilt øðrvísi statt. Vit eru á flestum økjum nógv fremri enn hasi londini, eitt nú búskaparliga og sosialt.

Í vetur hevur kjak fleiri ferðir tikið seg upp í fjølmiðlunum um íslendsku krónuna. Summi halda uppá, at krónan ikki dugur longur sum gjaldmiðil og at íslendingar sum skjótast eiga at taka sær evruna ístaðin?

- Hatta er gykl, álvaratos. Tað ber sjálvandi ikki til at taka evruna sum gjaldmiðil uttan at fara upp í ES og ES-limaskapur er, sum sagt, ikki á dagsskránni. Haraftrat er evran ikki tey gandaráð, ið summi vilja gera hana til. Uttan mun til um lond eru við í evrusamstarvinum ella ikki, so er tað búskaparstýringini, sum alt hongur á, antin hon er góð. Er hon ikki tað gongur av skriðuni, hvussu víkir og vendir.

So krónan er ov lítil til Ísland, meðni?

- Nei, tað er hon ikki. Men sjálvandi er hon lítil í tí stóra samanhanginum, eg meini í mun til onnur gjaldoyru. Og krónan liggur rímuliga eitt sindur óvard fyri eisini, av tí fíggjarflutningur millum Ísland og onnur lond er frælsur. Krónan er tí í einari óvanligari støðu samanborið við støðuna í mongum øðrum londum. Men um so var, at annar gjaldmiðil skuldi takast í nýtslu her á landi, er óvist um tað átti at verið evran ella dollarin. Veruleikin er tó, at hvørki er sannlíkt. Vert er eisini í hesum viðfangi at hava í huga, at stórur partur av okkara uttanríkishandli fer fram í dollarum. Útflutningurin er eisini í stóran mun í dollarum, handil við aliminiumi t.d. fer burturav fram í dollarum, fiskasøla partvíst í dollarum, ferðavinnan fyri tað mesta í dollarum, keyp- og søla av flogførum, sum hevur nógv at siga her, er í dollarum við. Hinvegin fer t.d. handil við fiskimjøli fram í pundum. So evran er ikki so týdningarmikil í viðskiftum okkara við umheimin, sum mong hava hug at halda, langt burturífrá, sigur íslendski forsætisráðharrin.